# Bronsan SKAL vinnast

Tað var ein ófatuliga vónbrotin Jóhann Nielsen, sum vit fingu orðið á eftir taptu hálvfinaluna móti Bermuda.

Og hann ásannaði alt fyri eitt, at føroyska liðið ikki var 100% til reiðar, tá dysturin fór ígongd.

- Eg haldi, at vit blivu eitt sindur kløkkir. Vit vistu, at teir høvdu stóra slagstyrki, men ikki at hon var so stór. Tað tók okkum á bóli, og tí tapa vit eisini fyrsta settið. Vit klára so eisini at berja okkum aftur í dystin. Vit vinna eitt sett, og vit hava handan settbóltin, sum tíverri kiksar.

*Teir taka so tað settið. Fara tit niður av høvdinum eftir tað?*

- Tað gera vit kanska. Men eg má siga, at hasin dómarin var ótrúliga vánaligur, uttan at tað tó skal verða nøkur umbering. Vit brúka bara alt ov nógvar kreftir upp á at skeldast við dómararnar, ístaðin fyri at lata liðskiparan um tað. Og tá vit so heldur ikki fáa okkara spæla at koyra, gongur tað galið. Og tað var altso einki serligt.

*Men enn er so bronsan eftir at spæla um. Megna tit at reisa tykkum aftur til tann dystin?*

- Beint nú er vónbrotið øgiligt, men vit skulu reisa okkum. Vit hava somikið gott lið, at eitt heiðursmerki skal við á heimferðini. Somikið einfalt er tað, helt Jóhann at enda.

**-jm**



*Jóhann Nielsen viðgekk eftir dystin, at hann og viðspælararnir vóru skelkaðir av slagstyrkini hjá Bermuda*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Føroyar-Bermuda 1-3 (20-25, 26-24, 24-26, 19-25):

# Føroyar sukku í Bermudatríkantinum

**Spælið kom ongantíð at koyra, og kreftirnar vórðu ístaðin nýttar upp á dómaran, tá føroyska manslandsliðið mátti veittrað farvæl til gullmerkini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup/Jens Kristian*

**Lerwick:** »Ein vakur deyði«. Soleiðis var yvirskriftin, tá Føroyar fyri tveimum árum síðani taptu eina intensa og framúr væl spælda finalu móti Saaremaa fyri tveimum árum síðani.

Hóskandi kundi »ein ljótur deði« verið nýtt sum yvirskrift hesaferð, tí tað var ikki nógv glamourøst yvir avrikinum, menninir í hálvfinaluni taptu fyri Bermuda.

### Sjálvgjørt

Frá fyrsta bólti tóktist tað hinvegin, sum var tað Bermuda, sum í størri mun vildi vinna dystin. Føroyingarnir tóktust hava fingið skeiva beinið fyrst inn á vøllin, og skjótt megnaðu teir reyðklæddi mótstøðumenninir at draga nakað frá.

Samstundis byrjaðu frustratiónir at koma fram á føroyska liðnum. Persónlig mistøk í hópatali kostaðu nógvar bóltar, og tá hinir ikki framdu somu mistøk, so kostaði tað altso.

Tað eydnaðist tó okkara at koma aftur í dystin. Næsta settið var vunnið, og eisini í triðja settinum var liðið á sigurskós. Fram til 24-23 vóru tað okkara, sum høvdu takið, men tá Rúni Weihe smekkaði jump-servuna í netið, tóktist ganga galið. Bermuda tók av møguleikanum. Teir vunnu settið. Og so komu frustratiónirnar av álvara í blóma.

Jú. Dómararnir vóru avgjørt ikki millum teir bestu, og ferð eftir ferð vóru feildømingar við netið, við sløgum og eftir linjunum. Men hesir dómar gingu báðar vegir.

Munurin var bara, at okkara spælarar lótu við seg koma. Kreftirnar vórðu nýttar á skeivum stað, og so fekk Bermuda lætt spæl. Teir vóru nú eisini so ruddiliga omaná sálarliga, og fagnaðurin bara vaks fyri hvønn bóltin, sum vunnin var. Eina lítla løtu tóktust okkara gera eina bjargingarroynd, tá 10-18 varð broytt til 15-19, men so var eisini liðugt. Bermuda streyk avstað við seinastu bóltunum - og finaluplássinum móti Saaremaa. Og so mugu okkara dreingir taka til takkar við einum dysti um bronsuna. Og tað kunnu teir einamest takka sær sjálvum fyri.



*Ein sigandi mynd. Føroyski liðskiparin í holt við at trætast við dómararnar. Rættvíst skal so eisini sigast, at Rúni langt ífrá var einsamallur um hesa deyðssynd*

# Sum ein brotin pedal

**Bogi Kristiansen noyddist at gevast í landavegskoyringini, tá ein pedal brotnaði**

SÚKKLING
*Jákup/Jens Kristian*

Lerwick: Tað gekst als ikki eftir vild hjá Boga Kristiansen í landavegskoyringini. Heldur ikki hesa ferð eydnaðist honum at fáa heiðursmerki í hesi kappingini, men sjálvur tóktist hann hampuliga avkláraður, tá vit fingu orðið á hann.

- Vit hava nakrar krampar á pedalunum, sum halda fótin fastan. Annar av hesum brotnaði, og so mátti eg gevast.

*Men ber ikki til at súkkla, uttan at hava slíkar krampar?*

- Nei, tað verður alt ov strævið. Tá vit súkkla, so nýta vit eisini kramparnar at draga pedalirnar, og tá tað ikki bar til longur, so valdi eg at gevast alt fyri eitt.

Og er tað eitt brek, sum tað ber til at rætta áðrenn býarkoyringina fríggjadagin.

- Tað vóni eg. Eg fann kramparnar aftur alt fyri eitt. Tað vísti seg, at onkur skrúva var farin í hesum, so nú mugu vit vita, hvørt tað ber til at fáa nakrar nýggjar skrúvur settar í.



*Heldur ikki hesa ferð eydnaðist Boga Kristiansen at vinna heiðursmerki í landavegskoyringini á oyggjaleikum*

### Býarkoyringin eftir

Soleiðis endaði landavegskoyringin hjá Boga, men framvegis má hann roknast sum besta boðið upp á eitt føroyskt heiðursmerki.

Tríggjar ferðir áður hevur hann fingið bronsu í býarkoyringini, og hann sigur eisini, at hetta verður tað, sum hann fer eftir fríggjadagin.

- Sjálvandi er eitt heiðursmerki vónin, men tað verður ófatuliga strævið. Feltið er øgiliga sterkt við Roche og liðfeløgum hansara av Man, so eg má bara royna at hanga í har frammi.

Men tað tykist vera ein kappingargrein, sum hóskar tær sera væl.

- Ja. Har eru nógv sving og tættir duellir, og tað dámar mær bara væl, sigur ein hóast alt vónríkur Bogi Kristiansen.

# Roche knekkaði

**Púra óvæntað vann ein súkklari av Bermuda landavegskoyringina. Gunnar Dahl-Olsen var besti føroyingurin á einum 10. plássi**

SÚKKLING
*Jákup/Jens Kristian*

**Lerwick:** Føroyar fáa heiðursmerki í býarkoyringini. Tað má í øllum førum verða niðurstøðan, nú tað ikki eydnaðist á landavegnum.

Føroysku súkklararnir plaga altíð at koma heim við einum heiðursmerki av onkrum slag, og skal tað vera, so skal tað nú verða í býarkoyringini.

Í landavegskoyringini eydnaðist nevnliga ikki at fáa metal av nøkrum slag, tá tað ikki eydnaðist Gunnari Dahl Olsen at hanga í, tá feltið fullkomuliga sprongdist á seinasta av teimum fimm umgangunum, sum súkklaðir vórðu.

Longu á fyrsta umganginum struku tríggir súkklarar avstað, og sum væntað, so var Andrew Roche av Isle of Man millum teirra, sum sótu í útbrotinum. Einum útbroti, sum alt fyri eitt vann eitt stórt hol niður til teir næstu.

Men púrasta óvæntað, so eydnaðist tað ikki hjá Roche at halda fast. Hann hevur annars verið at kalla einaráðandi á fleiri oyggjaleikum á rað, men tað eydnaðist so ikki hjá honum hesaferð. Ístaðin varð tað Geri Mewett av Bermuda, sum streyk fyrstur um málið, og síðani komu fýra Man-búgvar á næstu plássunum.

Gunnar Dahl-Olsen, sum altso hekk í feltinum stóran part av teininum, megnaði ikki at sita við heilt frammi, tá feltið skrædnaði, men eitt heiðurligt 10. pláss gjørdist talan so kortini um.

### Føroysku úrslitini

10 Gunnar D. Olsen +1,31
21 Eli Christiansen +10,02
28 Esmar Joensen +1 umfar



*Púra óvæntað kom Geri Mewett av Bermuda fyrstur um málstrikuna í landavegskoyringini*